# Ein skóti altíð fróur er

Lag: Se min bestilling

Ein skóti altíð fróur er
og altíð væl til hýrs,
hann vinur er við smábørn og
við gomul um tey fýrs,
hann hjálpir, har ið hjálpast kann,
við góðum ráðum fer:
um kroystan nagl, um brotið bein,
um arm, ið koyktur er.

Ert tú skóti,
ert tú skóti,
mást tú hjálpa,
um so alt tær gongst ímóti.

Tá pápi missir pípuna,
hann leitar sum ein hind,
og rópar, so tað hoyrist
líka upp á Malingstind,
hann grópar allar goymslur fram
og tømir hvørt eitt trog,
og fýkur runt í stovunum,
sum var tað grindaboð.

"Hoyr, pápi, ger tær einki stríð,"
so troystar Pætur hann,
"eg hugsi, at eg mestan veit,
hvar pípan vera man."
Hann rýkur út í gongina,
har gamla kotið er:
"So sanniliga, sært tú pápi,
pípa tín er her.

" Tá kúgvin hjá Hans Peturi
ein dagin datt um rygg,
tá Malan frá sær sjálvum var,
hon mól sum dunnan stygg.
Men Pætur sum ein hvirluvindur
inn á trøðna sprakk,
hann lyfti kúnna upp aftur,
og Malan segði takk.

Og hoyrir tú eitt neyðarróp
úr Sumba og í Klakk,
so er tað gamla Brita,
sum ein nagla í fótum stakk,
men Pætur hann fór fúkandi,
tann løtan var ei long,
og tók so naglan út aftur
við hamara og tong.

Tá Pætur síðst á fjalli var,
tá beinini hann breyt,
men Pætur helt: "Ver sjálvbjargin!"
og ráð ei honum treyt,
tók beinini á nakkan hann,
og bant tey fast við reim,
við hondunum í lummanum
so sjaggaði hann heim.

Gunnar Jørgensen
Sverri Fon týddi